



## Isadora and The Rebels

Bólkurin Isadora and The Rebels hevur veruliga sett sítt fingramerki á føroyska tónleikalívið seinasta árið. Við nógvum sannførandi framførslum hevur bólkurin staðfest seg millum fremstu bólkarnar í landinum, og bólkurin má metast sum ein av favorittunum til at vinna rættindi at umboða Føroyar í altjóða GBOB finaluni.

Bólkurin spælir eitt heilt serligt slag av rokktónleiki. Tey lýsa tónleikin sum eina samanrenning millum alternativan rokk/popptónleik. Guðrið Hansen er frontfigurur í bólkinum, og tað er eisini hon sum skrivar meginpartin av tónleikinum. Hana hava vit áður hoyrt í bólkinum PH 5,5 og eisini luttók hon í Singer/Songwrtier kappingini. Hon er ein heilt egin songkvinna, og nú tá ið hon hevur savnað ein bólk, hevur hennara tónleikur eitt heilt annað útrykk. Tó sigur Guðrið, at hennara tónleikur upprunaliga er skrivaður sum rokktónleikur, og sostatt hevur tað ikki verið nakar trupulleiki at »umseta« tónleikin frá kassagittara til ein rokkbólk.

Í fjør luttóku nógv konufólk í GBOB kappingini, men í ár sær tað higartil út til, at tað ikki verða nógv konufólk við í kappingini. Hví man tað vera so? Guðrið heldur, at konufólk ofta sakna tað neyðuga dirvið at mannað ein bólk. Tær eru bangnar fyri, at teirra egna tilfar ikki er gott nokk, og hetta heldur teimum aftur. Guðrið sigur sjálv, at tað tók henni nøkur ár, at taka seg saman og mannað ein bólk. Hetta er spell fyri tónleikalívið í Føroyum, sigur Guðrið við Sosialin.

**Teir sum mannað Isadora and The Rebels eru:**

**Guðrið Hansen:** ............................Sang, blokkfloytu & gittar
**Bartal Augustinsussen:** ................Gittar
**Fróði Hansen:** ...............................Trummur
**Andrias Pauli Poulsen:** .................Bass

## Boys in a Band

Vit sleppa at uppliva ein nýggjan konseptbólk á GBOB. Boys in a Band er ein rokkbólkur, sum ikki »bara« tekur ljóðførini og framførur sín tónleik. Bólkurin vil útstrála eina heild.

Boys in a Band er ein nýggjur bólkur. Hóast nakrir av limunum áður hava spælt saman, so er hetta fyrstu ferð at júst henda samansetingin av tónleikarum framførir saman. Og teir eru greiðir í síni talu – Boys in a Band eru komnir fyri at vera!

– Eg vil lýsa tónleikin undir heitinum Kovboy Rokk. Hetta er nútímans rokkur, sum vit kenna hann úr Onglandi og eisini úr Glasgow. Eisini finna vit íblástur hjá amerikanskum listafólkum so sum Bob Dylan, sigur Pætur Zachariassen við Sosialin.

– Bólkurin er eitt heilt konsept. Vit royna at vera 100% gjøgnumførdur í øllum tí vit gera. Tónleikur, tekstir, útsjónd og framførsla skal sampakkað við konseptið. Vit eru heilt tilvitaðir um, hvat ið vit vilja. Eg havi hugt eftir nógvum plakatum og myndum av føroyskum bólkum, og haldi at tónleikararnir altíð royna at fyrikoma myrkir og kulir. Vit eru tað mótsetta av hesi myrku ásjón.

Hvørjar vónir hava teir í bólkinum til GBOB kappingina? –Eg hugsi ikki so nógv um at vinna. Vit vilja bara spæla okkara tónleik og verða ordiliga væl nøgdir við okkara framførslu, sigur Pætur.

– Spurdir um teir leggja seg eftir at síggja hamrandi gott út, sigur Pætur greitt: - Nei, tað er av tilvild at vit síggja so gott út.

**Teir sum mannað Boys in a Band eru:**

**Pætur Zachariassen:** .....................Sang og gittar
**Heri Schwartz Jacobsen:** .............Tangentar og kór
**Heini Niclasen:** .............................Gittar og kór
**Símun Skorðastein:** ......................Bass
**Rógvi Lamhauge:** ..........................Trummur og kór

## Avoke

Bólkurin Avoke er mestsum eitt óskrivað blað í føroyskari tónleikasøgu. Bólkurin hevur bara eina framførslu undir beltinum, men tó eru limirnir í bólkinum varliga bjartskygdir um luttøkuna í GBOB.

Avoke er ein rættiliga nýggjur bólkur. Bólkurin varð stovnaður um Ólavsøkumundið í fjør. Tað var sangarin, Jov Lindenskov Helgason, sum tók stig til at mannað bólkin. Gittarleikarin Ken Lindenskov Olsen greiður frá, at bólkurin fór eldhugaður til verka, og fór undir at skriva tónleik. Og limirnir vóru stak væl nøgdir við úrslitið. Fyrsta framførslan hjá bólkinum var á Eystanstevnu fyrr í ár. Hendan konsertin gekk væl, og hetta gav limunum enn meiri blóð uppá tonna.

Ken sigur við Sosialin, at bólkurin leggur seg eftir at skriva harðan nútímans rokktónleik. Ljóðmyndin í tónleikinum er merkt av keyboards o.ø. elektriskum ljóðførum, sum gera tónleikin eitt sindur serligan. Hartil er tónleikurin kryddaður við góðum melodi´um.

Spurdur um hvørjar vónir Ken hevur til framførsluna á GBOB, sigur Ken soleiðis: - Um øll ljóðviðurskiftini eru í lagið, haldi eg, at vit saktans kunnu vinna okkum í tjóðarfinaluna. Tó ásannar Ken, at tað kann verða trupult at fáa tað fullkomna ljóðið, av tí at pallskiftini skulu ganga við tí rúkandi ferð.

**Teir sum mannað Avoke eru:**

**Jov Lindenskov Helgason:** ...........Sang
**Ken Lindenskov Olsen:** .................Tangentar
**Áki Troelst:** ....................................Gittar
**Bernhard Johannesen:** .................Bass
**Amon Ellingsgaard:** ......................Trummur
**Kári Bærendsen:** ...........................Gittar

## Synarchy

Bólkurin Synarchy var ein av teimum positivu upplivingumum við GBOB kappingini í fjør. Við eini garvillari framførslu vunnu teir seg í tjóðarfinaluna. Hóast teir ikki hava verið so øðiliga nógv frammi í seinastuni, mugu teir eisini metast millum teir betri bólkarnar í kappingini.

Bólkurin varð upprunaliga settur á stovn tíðliga í 2003. Sostatt er talan um ein bólk við eini søgu aftanfyri seg.

Á www.myspace.com/synarchy ber til at hoyra tvey løg hjá bólkinum. Her hoyrist at talan er um ein bólk sum spælir myrkan, harðan metaltónleik. Sangarin, Leon B. Hansson, varierar millum at »growla« og syngja við eini ljósari rødd. Tónleikurin er annars klassiskt heavy metal (um man kann siga soleiðis).

Tað hevur tíanverri ikki eydnast mær at fáa fatur á limunum í synarchy í skrivandi løtu. Eg veit tískil ikki so nógv um bólkin, men vil biðja lesaran um at halda mær til góðar, og eg skal royna at fáa gjørt eina samrøðu við bólkin áðrenn GBOB fer av bakkastokki.

**Teir sum mannað Synarchy eru:**

**Leon B. Hansson:** ..........................Sang
**John E. Láadal:** .............................Gittar og sang
**John Ivar Venned:** .........................Gittar
**Isak Petersen:** ...............................Bass
**Bjartur F. Clementsen:** ..................Tangentar
**Kim Joensen:** ................................Trummur